# Jákup Sverri Kass marknaðarstjóri á Smyril Line

Jákup Sverri Kass er frá 15. septembur 2007 settur í starv sum nýggjur sølu- og marknaðarstjóri hjá Smyril Line. Jákup Sverri Kass er 30 ára gamal og útbúgvin Cand. Ling.Merc. av Handilsháskúlanum í Århus. Síðan 1. oktober 2006 hevur Jákup Sverri starvast sum leiðari á føroysku søludeildini hjá Smyril Line, og hann hevur harafturat havt ábyrgdina av søluni á bretska- og svenska marknaðinum. Jákup Sverri Kass tekur við eftir Hendrik Egholm, sum tekur við sum nýggjur stjóri á Føroya Shell.



# Evnisdagur um at varðveita søgu



*Búgvi Jacobsen tekur ein upsa úr meskunum. Nú verður evnisdagur um varðveiting av okkara søgu, eisini vinnulívssøgu*

*Mynd: Maria Olsen*

**Í sambandi við, at Landsskjalasavnið hevur 75 ár á baki, verður skipað fyri einum evnisdegi í Norðurlandahúsinum 31. august. Ein av røðarunum verður Olaf Olsen, fyrrverandi stjóri á Beta og savnari av søguligum tilfari**

EVNISDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Evnisdagurin fer at snúgva seg um varðveiting av skjølum, sum lýsa okkara søgu, og eitt av evnunum, sum verður viðgjørt, verður varðveiting av okkara vinnusøgu.

Endamálið við evnisdegnum er at viðgera tørvin á varðveiting av skjølum og at vísa á teir møguleikar og avbjóðingar, sum eru.

- Serliga kann nevnast talgilda varðveitingin, sum bæði gevur nýggjar og betraðar møguleikar fyri varðveiting, men samstundis hevur við sær avbjóðingar og trupulleikar, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðuni.

Evnisdagurin fer eitt nú at leggja dent á vinnusøgu og skjøl frá virkjum, og millum røðararnar verður Olaf Olsen, fyrrverandi stjóri á Beta, sum fer at tosa um varðveiting av vinnulívsøvnum í Føroyum.

Eitt umboð fyri íslendska Kaupthing-bankan fer eisini at lýsa teirra royndir innan varðveiting av skjølum.

Evnisdagurin verður í Norðurlandahúsinum 31. august, og lagt verður fyri klokkan 13.30.

Kostnaðurin er 400 krónur, og tilmelding fer fram á telduposti fararch@lss.fo innan fríggjadagin 24. august.

Leinkjan til skránna fyri evnisdagin er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo



*Olaf Olsen, sum um felagið Beta Files hevur hópin av vinnulívsskjølum í varðveitslu, verður ein av luttakarunum á evnisdegnum*

*Mynd : Vilmund Jacobsen*

## Sjómansbúffar á Stangarbrúnni



Ein fastur táttur á Føroya Sjómannadegi í Klaksvík er, at Hotel Norð borðreiðir við leskiligum og vælsmakkandi festivalbúffum á bryggjuni.

Tí nýtist ongum at ganga svangur, sum hevur hug at leita sær til Klaksvíkar leygardagin, tá eisini verður ókeypis at koyra undir Leirvíksfirði.

Tey á Hotel Norð fara rættiliga at spíla seg út og gera sítt til, at fólk fáa mettuna - og ikki bara mettuna, men ein veruligan sjómansbúff við piparsós og øllum, sum har til hoyrir.

Tá búffurin er fingin niður um, fáa fólk belgiskar vaflir við róma og sóltutoyi. **(-vilmund)**

# Gorm sleit og rak á land

**Trolbáturin Gorm sleit endarnar síðstu nátt og rak á land undir Statoil í Saltangará. Skipið lá við Bakkafrost, tá endarnir slitnaðu í nógva vindinum, ið var hósnáttina**

ILLVEÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havnameistarin hjá Runavíkar havn, Jón Rosenblad, sigur, at hann var ikki sjálvur á vakt, tá trolbáturin hjá Rodmundi Nielsen sleit um 02-03-tíðina hósnáttina. Annar maður var í hansara stað.

- Sum eg havi skilt, var vindurin um einar 20-22 metrar um sekundið og í ælunum móti morgni upp í einar 25-26 metrar.

Jón sigur, at Tjaldrið, sum lá á Kollafirði, var skjótt hjá Gormi, fekk trolbátin leysan úr landi og sleipaði hann yvir á Skála.

- Eg dugi ikki at siga, um nakað er komið upp á skipið, men vónandi er tað ikki so, sigur havnameistarin.



*Gorm við bryggju á Bakkafrost, har hann vanliga liggur, tá skipið eru inni millum túrar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Jón Rosenblad sigur, at útnyrðingurin strekkir allan Skálafjørðin, men tíbetur hendi ikki øðrum skipum nakað, sum lógu við bryggju hósnáttina.